## Listaframsýning við Eli Smith

Mánadagin 14. september 2009 kl. 15 – 18 letur listamaðurin Eli Smith upp framsýning í Mentamálaráðnum, Hoyvíksvegi 72. Dóttirin, Anna á Váli Smith og Sára Olsen spæla cello og klaver til upplatingina. Fyri seks árum síðani valdi Eli Smith at royna seg við litum úr føroysku náttúruni, sum gav lív til eina røð av málningum úr reinum náttúrutilfari, so sum royðugrót, sandur, skeljar, torv og kol. Drúgvar arbeiðsroyndir og íblástur frá m.a. fornu egyptisku kongamálningunum og holumálningunum í Spania hava sannført hann um dygdina í hesum arbeiðshátti. Eisini hevur Eli arbeitt við verkætlanum at prýða rúm, bæði við málningum í Runavíkar Skúla og nú í seinastuni við mosaikki. Framsýningin, ið heldur fram til 11. desember, er opin mánadag til hósdag kl. 8 – 16 og fríggjadag kl. 8 – 15. Meira stendur at lesa inni á heimasíðuni www.eli.fo.



# Frítíðarskúlin missir pedagogar

**Í Hoyvík hevur frítíðarskúlin mist helvtina av pedagogunum og Levi Mørk og Charlotta á Váli, námsfrøðingar, vilja ikki liva við støðuni og brigsla pedagogfelagnum. – Vit fylgja við og tað er ein stórur trupulleiki, at pedagogar ikki kunnu fáa full størv, sigur Jarvin F. Hansen, formaður í pedagogfelagnum**

DAGTILBOÐ

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Hóast Jarvin F. Hansen, fakfelagsformaður, og Levi Mørk, námsfrøðingur, eru ósamdir um leiklutin hjá pedagogfelagnum í frískúlunum, so eru teir á einum máli um at tilboðið verður verri í løtuni*

*Tilvildarlig mynd*

Í lesarabrævi undrast Levi Mørk, námsfrøðingur, at frítíðarskúlin verður so lítið raðfestur. Hann nevnir millum annað, at frítíðarskúlin, har hann starvast, hevur mist helvtina av námsfrøðingunum, tí ov fáir tímar eru til at halda námsfrøðingunum í starvi og tí fáa børnini eitt verri tilboð.

Orsøkin til at frítíðarskúlin nú hevur færri tímar til børnini er, at børnini nú eru fleiri tímar í skúla.

Jarvin F. Hansen, formaður í pedagogfelagnum, tekur undir við Levi Mørk, at tilboðið til børnini verður verri, men hann staðfestir somuleiðis, at frítíðarskúli ikki er eitt krav og tí er torført at siga, at frítíðarskúlarnir hava mist tímar til fólkaskúlan.

### Felagið fylgir við

Levi Mørk hevur hug at finnast at pedagogfelagnum, at tað ikki hevur fylgt við í tilgongdini, sum ger frítíðarskúlan verri, men hesum vísir Jarvin F. Hansen aftur.

- Vit hava diskuterað støðuna í felagnum, og tað hevur fylt nógv síðan seinasta aðalfund. Vit undrast eisini, at vit ikki eru tikin við upp á ráð, tá fólkaskúlin skuldi hava fleiri tímar. Men nú eru vit í dialogi við avvarðandi partar, sigur Jarvin F. Hansen.

Hann sigur somuleiðis, at tað undrar, at ongar fakligar grundgevingar eru komnar fyri, at børnini skulu hava fleiri tímar.

### Kommunan sparir

Tá frítíðarskúlin hevur færri tímar, merkir tað, at kommunan sparir pening, tí tað er landið, sum hevur skúlan um hendi, meðan kommunan hevur frítíðarskúlan.

Jarvin F. Hansen staðfestir, at hóast børnini í grannalondunum hava fingið fleiri vanligar skúlatímar, so hava frítíðarskúlarnir onki mist har.

- Har hava pedagogarnir fingið fleiri tímar at fyrireika seg, men í Føroyum hava teir bara mist tímar, sigur formaðurin í Pedagogfelagnum.

### Aðrir møguleikar

Jarvin F. Hansen greiðir frá, at hóast frítíðarskúlin missir tímar, so eru aðrir møguleikar, soleiðis at pedagogarnir hava nóg mikið av tímum.

- Ein møguleiki er at tvinna frítíðarskúlarnar saman við klubtilboðunum, soleiðis sum tað er gjørt í ávísum støðum í Føroyum. Har hevur frítíðarskúlin tilboð allan seinnapartin og út á kvøldið, so og soleiðis eru fleiri heil størv, greiðir Jarvin F. Hansen frá.

# Atlantic Petroleum á vandalista

**Økonomisk Ugebrev hevur Atlantic Petroleum á einum lista fyri fyritøkur, sum eru í vanda fyri húsagangi. Hesum vísir Vilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum, aftur**

ÚTLIT

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Á einum lista, sum Økonomisk Ugebrev í Danmark hevur gjørt, er Atlantic Petroleum á einum lista við 22 øðrum fyritøkum, sum eru í vanda fyri húsagangi. Víst verður á, at føroyska oljufelagið er í serliga stórum vanda útfrá greiningini, sum er gjørd frá roknskapinum fyri 2008.

Vilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum, vísir aftur, at felagið er í trupulleikum í dag.

- Hatta er ein kanning, sum er gjørd út frá tølum fyri ultimo 2008, og grundgivið verður, at hendir onki munagott, so er felagið í veruligum trupulleikum. Vit hava gjørt nógvar broytingar, sum eisini lógu í kortinum tá, men av tí at greiningin er gjørd frá tølum, tá oljuprísurin var lágur og felagið bíðaði eftir nøkrum hendingum, sum vóru seinkaðar, so sær úrslitið soleiðis út, sigur stjórin í Atlantic Petroleum.

### Støðan broytt

Vilhelm Petersen vísir á, at støðan í fyritøkuni er munandi broytt, millum annað við at skuldin ikki longur er stuttfreistað.

- Vit máttu gera nakrar broytingar, og tær hava vit gjørt. Í upplýsingunum hjá Økonomisk Ugebrev er skuldin hjá felagnum stuttfreistað, men hetta varð til dømis broytt í summar, sigur Vilhelm Petersen.

Somuleiðis sigur hann, at tingini síggja nógv bjartari út nú, og at tað alla tíðina var ætlanin at gera broytingar fyri at styrkja felagið.

Økonomisk Ugebrev vísir eisini á, at fyritøkurnar, sum eru nevndar í greiningini hjá teimum, hava gjørt munandi broytingar síðan 2008, har leiðslurnar hava arbeitt við bjargingarætlanum.



*Føroyska oljufelagi er á lista hjá Økonomisk Ugebrev fyri børsskrásettar fyritøkur í vanda fyri húsagangi*